


Bjarni Mikkelsen
Lívfrøðingur

# Kópurin, sum s

**Ein dagin í oktober fekk Føroya Náttúrugripasavn fyrispurning frá manni, ið ein illveðursdag hevði tikið mynd av einum kópi, sum spældi í briminum – hvat var tað fyri gátufør dós við antennu, sum sat á grúkinum? Jú, tað kundi skjótt staðfestast, at hetta var ein av tíggju kópum, ið eru merktir við fylgisveinasendarum seinastu tvey árini. Hetta er gjørt fyri at kanna ferðingarmynstrið hjá føroyska kópinum**





Mynd 4
*Kópur við fylgisveinasendara*

Tað var undir bakkanum í Koltri, at kópurin var avmyndaður henda illfýsna dagin í oktober í fjør. Ein dagin í juli hevði hon – tað var ein opna – svomið smidlig og óttaleys í sjóvarmálanum í Lokloysi vestantil á Sandoynni. Hon hevði ikki minsta gruna um, at henda dagin høvdu fólk frá Náttúrugripasavninum sett eitt garn júst har, hon kom svimjandi. Og hon varnaðist ikki garnið fyrr enn ov seint var.

Hon verður kvikliga loyst úr garninum og fingin niður í ein tættmeskaðan netaposa, soleiðis at hon ikki fær bitið frá sær. Umborð á bátinum verður hon varliga spent føst á plátu við fleiri spennum, soleiðis at hon liggur still. Síðan verður hon vaskað um grúkin, til ullin skínur. Hetta er umráðandi, tí límið stadnar eftir 10 minuttum, og fylgisveinasendarin má haldast stillur og fast at reinu ullini, fyri at fáa best møguligt festi.

Og so á sjógv aftur, kanska eitt sindur fjáltrað, tí hetta var ikki gerandiskostur, ið henni varð fyri. Men alt gekk væl hesa ferð eisini. Hvørki fylgisveinasendarin ella framferðarhátturin, ið hevur landsdjóralæknans vælsignilsi, ávirka kópin nevnivert. Sendarin losnar av aftur komandi vár, tá ið opnan losar.

## Kópur á ferð

So er gerandisdagur aftur. Hon leggur út á ferð, óvitandi um at

Sosialurin